# Næstan bara mannfólk taka avgerðirnar

**Hóast konufólkini vóru væl fleiri, enn tey plaga at vera á aðalfundinum, so eru tað framvegis fyri tað mesta menninir, sum taka avgerðirnar í føroyskum fótbólti**



FSF ÁRSAÐALFUNDUR

*Jákup Mørk*

Fótbóltur er ein mannfólkaheimur. Soleiðis verður mangan tikið til. Og hóast kvinnurnar hava verið partur av føroyska fótbóltinum í út ímóti tjúgu árum, so er tað framvegis soleiðis, at tað eru menninir, sum manna plássini, tá ið avgerðirnar skulu takast.

FSF aðalfundurin í Útvarpshøllini leygardagin var eitt gott dømi um, at tað framvegis eru menninir og næstan bara menninir, sum eiga avgerandi orðið. Men fundurin var eisini eitt dømi um, at kvinnurnar so spakuliga eru við at vinna inn í fótbóltsheimin.

Sambært fundarfrágreiðingini, sum longu sunnudagin var tøk á heimasíðuni hjá FSF, vóru tvey limafeløg ikki umboðað á fundinum. Tey vóru Streymur og NÍF, sum er Nólsoyar Ítróttarfelag.

Hini tjúgu feløgini vóru umboðað, og av teimum vóru tað fýra, sum høvdu konufólk í umboðanini. Hildigarð Eliasen var annað av umboðunum hjá ÍF, Rebekka Lisberg var annað av umboðunum hjá Sumba, og í umboðanini hjá Skála vóru kvinnurnar í meiriluta. Tvey av trimum umboðum vóru konufólk – Olina Berg og Heidi Niclasen.

Feløgini vóru annars umboðað soleiðis:

AB: Tórálvur Stenberg og Sigmar Jacobsen. B36: Kristian á Neystavbø, Jón Johansen og Kjartan Mohr. B68: Niclas Davidsen og Eyðfinn Olsen. B71: Eli Hentze og Hans Falkvard Hansen. EB: Olaf Fríðheim og Magnus Magnussen. Fram: Ørvur H. Á Lag. GÍ: Jógvan Gregersen og Brandur Jacobsen. HB: Birgir Enghamar, Niels J. Arge og Steinfinn Mittelsten. ÍF: Hildigarð Eliasen og Símun Fornagarð. KÍ: Gestur Hovgaard, Markur Tummas Jacobsen og Hans Jákup Heinesen. LÍF: Jógvan Júst Olsen, Kári Nolsøe Olsen og Tórolvur Joensen. MB: Frits Witt og Wensil Nattestad. NSÍ: Jákup Mortensen og Jonhard Hansen. Royn: Jonhard Thomsen, Martin í Nesi og Áki Bertholdsen. SÍ: Heini Davidsen. SÍF: Atli Gregersen og Alfred Joensen. Skála: Olina Berg, Hans Jákup Høj og Heidi Niclasen. Sumba: Rúni Lisberg og Rebekka Lisberg. TB: Sofus Laðanberg og Petur Joensen. VB: Hans Petur Kjærbo.

# Todi kann enda í fellu

**FIFA ásetingar um, at tað bara er loyvt at skifta felag eina ferð í einum álmanakkaári, kann bera við sær, at føroyski FCK spælarin verður sitandi á áskoðaraplássunum inntil í summar**



ÚTISETI

*Jákup Mørk*

Tað er hugsandi, at Todi Jónsson als ikki sleppur upp í part á grasvøllunum í Danmark frá nú av og inntil sáttmálaskeiðið hjá honum í FCK verður lokið 30. juni. Í hvussu so er, tá ið talan er um dystir.

Síðani Todi fekk at vita, at hann ikki var í 24 manna hópinum hjá, sum hevur verið í Suðurafriku á venjingarlegu, hevur verið greitt, at hann ikki fer at sleppa upp í part á besta FCK liðnum, sum fer at spæla um meistaraskapin. Um Todi skal sleppa upp í part, so skal okkurt heilt óvæntað fara fram.

Í síðstu viku varð tosað um, at Todi møguliga skuldi leigast út til okkurt annað felag í superliguni, og Todi segði sjálvur við danskar fjølmiðlar, at hann var áhugaður í hesum. Ekstrablaðið visti leygardagin at siga, at trý feløg eru áhugað í at leiga Toda frá nú av og tað, sum er eftir av hesum kappingarárinum. Feløgini sigast vera AGF, sum Todi spældi fyri eitt skifti í unglingaárunum, OB og Viborg. Todi Jónsson hevur sjálvur einki sagt um, hvørji feløgini eru, sum sigast vera áhugað í at gera leigusáttmála við FCK.

### FIFA reglur kunnu forða

Todi Jónsson er ikki hvør sum helst í donskum fótbólti. Tí er stórur áhugi fyri, hvar hann fer at spæla í framtíðini, og donsku fjølmiðlarnir viðgera ofta henda spurningin.

Ekstrablaðið visti leygardagin at siga, at nýggjar FIFA ásetingar kunnu gerast rættuligir fótonglar fyri fótbóltsspælinum hjá Toda Jónsson tað, sum er eftir av árinum. Blaðið vísti á, at nýggjar FIFA ásetingar siga, at tað er ikki loyvt einum spælara at skifta felag meiri enn eina ferð í einum og sama álmanakkaári. Tað vil siga, at um Todi Jónsson verður útleigaður frá FCK og til t. d. OB frá nú av og inntil í summar, so verður honum ikki loyvt at skifta til annað felag fyrr enn eftir ársskiftið.

Sum kunnugt vóru franska Lille og Todi Jónsson samd um, at Todi skuldi skifta til franska felagið í januar. Men FCK segði nei, og nú eru líkindi fyri, at FCK hevndin fyri, at Todi ikki vildi leingja samstarvið við teir eftir treytunum, sum teir bjóðaðu, fer at kosta uppaftur meiri, enn tað í fyrstu atløgu tóktist, at hon fór at gera. Um hann fer til eitt danskt felag nú, so kann tað væl vera, at tað verður honum ikki loyvt at fara til eitt útlendskt felag fyrrenn eftir ársskiftið, og tað kann verða rættuliga óheppið.

Todi Jónsson sigur við Ekstrablaðið leygardagin, at umboðsmenninir hjá honum, Karsten Aabrink og Lars Skjøth, hava kunnað hann um FIFA regluna, og at teir siga, at reglan bara er galdandi, tá ið talan er um skifti millum tvey donsk feløg, og at hon ikki er galdandi, tá ið talan er um skifti til eitt danskt felag og so eitt útlendskt felag í sama álmanakkaári.

Men Ekstrablaðið sigur seg vera rættuliga víst í, at nýggja reglan eisini er galdandi í hesum førinum. Nú fæst at síggja. Undir øllum umstøðum er tað harmuligt, um Todi ikki fer at fáa dystarvenjing í vár, og tað verður eyka harmuligt, um hann ikki í summar fer at fáa dreymin um at spæla uttanlands gjørdan til veruleika.



## VIÐMERKINGAR

# Søluátak sambandsfloksins

**Hergeir Nielsen**



Sambandsflokkurin lat Kaj Leo Johannesen stinga fingurin í jørðina, at vita hvussu ES-lagið var á tingmonnum.

Uppskotið um ES-limaskap kom á tingborð ein mánaða undan jólum, og fyri at fáa sum frægast av umrøðu kom málið ikki á dagsskrá fyrr enn árið eftir.

Fjúrtan dagar inni í nýggja árium varð málið so sett á dagsskrá, og er tað nú avgreitt av løgtinginum.

Sæð við eygum sambandsfloksins, fekk tað eina syndarliga lagnu.

Í uttanlandsnevnindini tók Sambandsflokkurin ikki undir við tí, og á tingi fekk tað onga atkvøðu.

Undir aðru viðger kom kortini skilliga fram, at andstøðulimirnir í uttanlandsnevndini ikki vildu kennast við støðu sína.

Ein samd nevnd tók ikki undir við málinum, søgdu teir saman við okkum øðrum í álitinum, og somu støðu tók so løgtingið.

Vanliga plaga teir at trokað seg fram at mikrofonunum, og har siga seg ikki hava sagt tað, sum teir hava sagt, men hesuferð fóru teir so eitt stig longur.

Nú vildu teir hava málið aftur í nevnd, men fingu teir bert 10 atkvøður fyri at gera sítt egna nevndarariðið umaftur.

Skilligt er, at Kaj Leo Johannesen, sum legði navn til uppskotið, man vera ein ótrúliga vónbrotin maður.

Tað er í sjálvum sær ein long og torfør uppgáva, tá ið umsøkjarin ikki er førur fyri, og ikki sær seg føran fyri at uppfylla høvuðs-fortreytina fyri limaskapi i einum samveldi.

Limaskapur í ES treytar nevniliga, at tú hevur ein sjálvstøðugan lim at lima inn. Og hendan limin ræðist sambandsflokkurin.

At leita eftir fyrimunum og vansum við EU - limaskapi gerst bert við at samráðast um limaskap.

Møguligt er tá at fáa treytir og fyrivarni á pappíri, men eingin trygd kann veitast fyri, hvussu leingi hesi fyrivarni og hesar treytir halda sær. Allar royndir vísa, at øll fyrivarni bert liva í stutta tíð.

Harafturat er signalvirðið av øllum limaskapsroyndum, at alt verandi samskiftið og øll verandi menning fær álvarslig skot fyri bógvin.

Hetta tykist tó ikki nervað sambandsflokkin, sum er við at nærkast eini skelkingarfasu, nú Danmark fer at grundlógartryggja sær nýggja ríkjafelagsskapin aðrar vegir, meðan vit føroyingar bert hava marginalan áhuga í teirra verð.

Undir 1. viðger royndi sambandsflokkurin at sannføra alt og øll um, at ætlanin var ikki at lata ein stert undan Føroyum sum gjald fyri limaskap í ES.

Hvar vit annars kundu lata, ella fáa, fingu vit so at siga einki at vita um.

ES - málið er regluliga umrøtt, men rætt er, at tað er ikki umrøtt við beinleiðis støðutakan til limaskap ella ikki, og tað brýggja fólk flest seg ikki um.

Hví uppskotsstillarin segði, at vit vóru noydd at taka eina støðu, tá vit hava tikið eina støðu, er ikki gott at vita. Tað munnu vera ein 30 ár síðan, at vit føroyingar tóku støðu til at vera uttanfyri ES.

Uppskotstillarin helt okkum vera eftirbát eftir ES, men var ikki førur fyri at sannføra okkum um, at so var.

Vit sóknaðust eftir, um føroyingar fóru at vera eins fegnir og spaniólar, portugisar, bretar, og danir, tá teir í felag fóru at draga ogn føroya fólks av okkara grunni?

Um sølumenninir í sambandslokkinum fingu sín vilja, so fóru 20 - 25 lond at kappast um at niðurfiska stovnarnar í føroyskum sjógvi.

Talan hevði tá verið um størstu útsølu av føroyskum áhugamálum nakrantíð, og tíbetur vóru sølumenninir riknir eftir hæli.

Integratiónin, samstarvið ella avhendingin av suvereniteti til ES er komin longst á fiskivinnu- og landbúnaðarøkinum.

Øll lóggáva á fiskivinnuøkinum liggur í Bruxelles, og limalondini, eitt nú Danmark, hava ongan fiskimálaráðharra longur.

Vilja vit føroyingar sleppa stýringini av fiskivinnuni av hondum?

Síðani søgdu teir, at vit fingu tey undantøk vit høvdu brúk fyri.

Eingin ivi er um tað, men higartil hava øll undantøk livað eins leingi og lundi á jólanátt, og síðani eru tey horvin. Tey donsku doyggja soleiðis strádeyðan fyrsta dagin. Har er endamálið rokkið.

Fólkið har varð villleitt við undantøkum og veto-rættindum, og nú tað ikki slepst útaftur, verða hesir fyrimunir strikaðir.

ES-málið er sera viðkomandi og av alstórum týdningi. Har stendur um føðingina av eini samveldis- ella statsskipan við egnari grundlóg.

At viðgera ES og okkara støðu í hesum samanhangi er ein sjálvfylgja. ES fer saman við Danmark ein veg, ið ber longur og longur burtur frá ríkisfelagsskapinum millum Danmark, Føroyar og Grønland.

Vit hanga enn uppi í honum, meðan Danmark er á veg burturúr.

Hvønn týdning fara rembingarnar har niðri at fáa fyri tað føroyska samfelagið?

Er nakað samskiftið yvirhøvur um stjórnarskipanarligar broytingar landanna millum, spyrja vit?

Er tað ikki rættiliga viðkomandi fyri framtíðarstøðu Føroya, hvar vit enda, nú danir verða málaðir upp í ein krók av fransmonnum, týskarum og øðrum, sum eru við at seta seg oman á alt Evropa.

Av yvirskipaðum týdningi er, at framtíðarstøða Føroya verður skipað av føroyingum sjálvum. Hetta gerst bert, um vit hava fult ræði á egnum viðurskiftum. Tástani kunnu vit samráðast aðrar vegir um samstarv á jøvnum føti við onnur.

At blaka føðilandið Føroyar fyri hund og ravn - ella inn í EU sum danskan landslut - er størsta ábyrgdarloysi hugsast kann.

Hildið verður, at uppskotið hjá sambandsflokkinum er ein miðvís herferð tann vegin.

Vit fingu ábendingar um hetta, nú vit viðgjørdu uppskot hansara um limaskap. Uppskotið var alt ov trongt og alt ov avmarkandi, og varð tí skotið niður í sand og øsku.

Vit verða bara syft inn um EU-múrarnar eina ferð. Eftir tann dag verða tað aðrir, ið fara at ráða fyri okkara borgum, og Gud man vita, hvar vit tá drekka onnur jól.

Lat okkum tí, so sum sagt varð í álitinum, miðja eftir eini ráðstevna um alt okkara samskifti við ES, og tástani gera okkum eina hugmynd um, hvussu vit skulu telva víðari fram í hesum týdningarmikla máli.

Svar til Kaj Leo

# Kapping ella ikki

**Óli Jacobsen**



Kaj Leo Johannesen, løgtingsmaður, hevur í Sosialinum og Dimmalætting spurt um støðuna hjá fiskimannafelagnum til kapping í veiðuliðnum.

Hann vísir til okkara støðu viðvíkjandi kapping í virkisliðnum, og tað skilst millum reglurnar, at Kaj Leo ikki heldur, at samsvar er millum hesi sjónarmið um virkisliðið og so kappingarstøðuna í veiðuliðinum.

Tað kundi verið skrivað en hóp um hetta evni. Men tað skal ikki gerast her. Men sigast tó, at hóast spurningur er einfaldur, so kann hann neyvan svarast eins einfalt.

Taka vit virkisliðið var jú støðan tann fram til endan av 80-unum, at her var talan um planøkonomi, eins og í Ruslandi fyrr.

Ein flakavirkisleiðari var ikki annað enn ein uppsitari. Hann hevði onga ávirkan á prísin, hann rindaði fyri fiskin. Hann hevði onga ávirkan á hvat hann framleiddi ella hvat hann fekk fyri liðnu vøruna. Hetta hevði heldur ikki tann stóra áhugan. Tað sum ráddi um, var at halda seg so nær sum gjørligt til tey tøl fyri framleiðsluútreslur, sum vóru ásett kalkulatióni hjá ráfiskagrunninum fyri tey ymisku fiskasløgini. Gjørdi hann tað, var honum tryggjað eitt ætlað rakstarúrslit, tá roknskapurin skuldi gerast upp. Úrslitið av hesi skipan var ein fíggjarlig vanlukka fyri sovæl virkislið sum fyri samfelagið yvirhøvur. Størri og størri partur av framleiðsluvirðinum fór til útreiðslur hjá veiðuleiðnum og tess minni var ráð at rinda fyri fiskin. Hetta kundi fyrstu tíðina kamuflerast við hægri studningi og tá kreppaði byrjaði sást greitt úrslitið av hesi skipan.

Hóast í seinna lagi, so var tað vinnan, her ikki minst FF, sum fekk lagt upp til tann marknaðarbúskap fyri vinnuna, sum varð samtyktur á tingi í 1988, og sum vendi øllum hesum. Virkini fingu sjálvi ábyrgdina av keyp og sølu av fiski og av at halda útreiðslurnar lægst møguligt fyri at kunna kappast við grannavirkið.

### Kann ikki sammetast við veiðiflotan

Tað er eitt sindur trupult at síggja hvussu vinnuumstøðurnar hjá fiskiskipum kunnu sammetast við tey á landi, sum tey vóru.

Skipini bæði vóru og eru undir marknaðartreytum. Tað, sum um ræður hjá skipara og reiðara, er at veiða mest møguligt og at fáa mest møguligt fyri fiskin. Reiðarin skal sjálvsagt royna at hava útreiðslurnar so lágar sum gjørligt. Hetta er heilt frá keyp av olju sum til val av fígging og nógv annað. Her er reiðarin nærum fult út »sin egen lykkes smed«.

Tað sum Kaj Leo nú sóknast eftir er eini kapping um fiskiloyvi. Sum tað skilst, skal tann fáa fiskiloyvi, sum vil gjalda mest. Hetta er nærmast ein heilt annar spurningur, sum fyrr hevur verið reistur á meira akademiskum støði.

Hetta sigur nakað um, hvussu skjótt vit øll eru um at gloyma. Vit skulu ikki fara longur aftur enn til 80-ini, tá tað varð roknað sum nærmast óhugsandi, at skipini nakrantíð kundu klára seg uttan almennan studning. Hetta var nærmast fatað sum ein náttúrulóg. Men tað er hetta sum er støðan í dag. Tískil skuldu øll verið lukkulig um at tað eftir so stuttari tíð er eydnast at náa einum slíkum einaferð óhugsandi máli.

Ein av fremstu orsøkunum fyri hesum er, at tað júst hevur verið frí kapping hjá skipunum, meðan tað manglaði hjá virkisliðnum. Hugskotið hjá Kaj Leo um kapping um fiskiloyvi, kemur í hvussu er at merkja ein nýggj útreiðsla hjá vinnuni. Og at tað skal kunna menna vinnuna er ringt at síggja. Og tað er neyvan nakrastaðni í heiminum, at ein slík skipan er í gildi.

Her berjast tey móti kreppu í vinnuni, og t.d. í ES vildu tey verið meira enn fegin, um tey høvdu eina vinnu sum kundi bera seg sjálva. Í ES tykist »loysnin« at vera at fáa avtikið fiskivinnu í størst møguligan mun. Síggi beint í Dansk Fiskeritidende, at bretska stjórnin hevur samtykt at veita 675 mill.kr. í kreppuhjálp bert til teirra flota. Ein stórur partur skal fara til upphøggingarstuðul.

Hinvegin er tað gott, at menn sum Kaj Leo vilja hava kjak um slík viðurskifti. Og einum slíkum kjaki eiga partarnir í vinnuni heldur ikki at verða ræddir fyri.

Svarið uppá spurningin hjá Kaj Leo er, at sjálvsagt gongur FF inn fyri kapping í veiðuliðnum. Men hesa kapping hava vit longu í eins stóran mun sum í virkisliðnum. At ein kapping framhaldandi skal stimbrast og mennast er ein sjálvfylgja.